# OKKARA BEST



**ÍBÚÐ** – Tú kanst ætla, hvussu ørkymlandi støðan var: Vit komu úr einum stórum sethúsum í Rituvík og skuldu nú flyta inn í eina lítla íbúð í Runavík. Alt var kaos, tí vit høvdu rættiliga nógvar møblar og annað innbúgv, sum vit als ikki høvdu pláss fyri longur, sigur Rannvá Nielsen, sum hevur búð í íbúðini síðani í mars mánaði í fjør. – Her var bara eitt at gera hjá mær og manninum: Vit máttu sortera, sortera og aftur sortera burtur.



## Rulla oman

*Íbúðin hjá Rannvá og Eyðálvi, sum bæði eru í 50'unum, liggur miðskeiðis í Runavík, men er kortini burtur frá alfaravegi. Rannvá arbeiðir sum deildarleiðari hjá TAKS í Runavík, meðan Eyðálvur er fyritíðarpensjónistur. Økið, tey búgva í er sera veðurgott, og liggur beint omanfyri Eysturoyar Ellis- og røktarheim í Runavík. Júst hetta hevur eisini verið orsøkin til eina "interna joke": – Tað verður so lætt hjá okkum, tá vit bæði gerast gomul. Tá kunnu vit bara rulla oman á røktarheimið, siga Rannvá og Eyðálvur við einum brosi.*

Snorri Brend

**Runavík:** – Vit búðu frammanundan í einum sethúsum, ið stóðu uttarlaga í Rituvík, greiðir Rannvá Nielsen, sum er ættað haðani, frá.

Hesi vóru rættiliga stór og høvdu so líðandi eisini nøkur ár á baki, og mundu tí eisini treingja til ávísar ábøtur.

– Vit mettu sjálvi, at tað var tungt at halda tey viðlíka, serliga tá ein hugsar, um at vit ikki vóru heilt ung longur og at maðurin ikki kundi gera tað hann ynskti, orsakað av sjúku.

– Ja, tað bleiv faktiskt næstan til tað, at húsini gjørdust ein marra fyri okkum, staðfestir Rannvá.

Tey fingu tá at frætta um ætlanirnar hjá VIST09 um at fara undir bygging av nýggjum og snotuligum íbúðum í Runavík. Tað vardi heldur

## » Tað bleiv næstan til tað, at húsini gjørdust ein marra fyri okkum

ikki leingi fyrrenn tey komu til ta niðurstøðu, at ein íbúð í hesum økinum nøktaði júst teirra tørv.

Og her var veruliga nógv at koma eftir: Íbúðirnar vóru væl innrættaðar við øllum nútímans hentleikum; tær vóru nýggjar; høvdu trý kømur, sum júst hóskaðu til eina familju við tveimum børnum; tær vóru lættar at koma til; tær vóru lættar at halda; tær lógu í einum sera náttúruvøkrum øki, ovarlaga í Runavík beint við hagan; og so lógu tær við ein endaveg, har bert tey ið búgva her, ferðast dagliga.

Tá tey settu seg í samband við Andreas Andreasen hjá VIST09 vísti tað seg, at tey vóru ov sein. Fólk høvdu av sonnum tikið hesa ætlanina til sín, og tí var ein bíðilisti fyri at ogna sær eina íbúð.

Men hvussu var og ikki: Rannvá og Eyðálvur fingu kortini eina íbúð, eftir at hava selt síni egnu hús í Rituvík.

– Ja, vit eru sera glað fyri hesa íbúðina, sláa tey bæði fast.

### Úr øllum heraðshornum

Tá fólk soleiðis flyta í eitt nýtt íbúðarøki, er altíð spenningur um, hvørjir grannarnir eru og hvussu